

## Dystur hjá Rógva fluttur

Dysturin hjá íslendska felagnum KR, ið skuldi verða spældur í gjár, var útsettur til í dag. KR, har Rógvi Jacobsen spælir við, skal spæla á útivølli ímóti ÍBV, og sambært heimasíðuni hjá KR er tað sannlíkt, at dysturin verður spældur kl. 20.15 í kvøld. Símun Samuelsen og liðfelagarnir í Keflavík skulu eisini spæla dyst í kvøld. Teir spæla á útivølli ímóti Fylkir í kvøld kl. 20.15.

## Ongland skal brúka Walcott

Fyrrverandi liðformaðurin á enska fótbóltslandsliðnum, Alan Shearer, heldur, at enski landsliðsvenjarin eigur at brúka tann blaðunga álopsspælaran Theo Walcott í HM-endaspælinum. Shearer sigur við enskar fjølmiðlar, at tað kann ikki verða rætt, at miðvallarspælarar verða brúktir í álopinum hjá Onglandi. Hann heldur, at landsliðsvenjarin eigur at geva eitt nú Walcott kjansin undir HM-kappingini. 17 ára gamli Theo Walcott hevur spælt 30 minuttir á landsliðnum og var púra óvæntað tikin út til HM-endaspælið.

B36-VB/Sumba 2-2 (2-1):

# B36 fór niður um botnin

**Við fleiri púra óroyndum spælarum á liðnum og við hvøssum superveterani í fremstu røð megnaði VB/Sumba at fáa eitt stig í Gundadali, og um heilt væl vildi til, so fingu teir alt við sær suður**

B36-VB/SUMBA
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

At fótbóltur er ein undarlig telving, og at tað so skjótt kann vera, at tað, sum tykist venda niður vendir upp, var seinnaparturin sunnudagin í Gundadali góð áminning um.

Meistararnir í B36, sum út frá hagtølum og gongdini higartil í ár tóktust skula heinta stigini við kassa eitt, kiksaðu ímóti kreppurakta VB/Sumba. Í staðin fyri svarið upp á spurningin, hvussu stórur heimasigurin fór at vera, endaði tað 2-2, og um heilt væl vildi við hjá suðuroyarliðnum, so fóru teir við øllum.

Eingin, sum hevur fylgt við í føroyskum fótbólti nógvu tey seinastu árini, ivast í máltevinum hjá Birgiri Jørgensen. Sunnudagin javnaði hann til 2-2, tá ið tað restaðu tíggju minuttir. Skjótt mótálop í høgru og framlegging frá Evrard Ble, sum saman við Christiani Soelberg var ótroyttiligur á miðvøllinum, endaði við fínari skotroynd í handara síðunetið.

Frammanundan hevði Birgir fleiri ferðir verið upp á spæl. Tá ið stórur hálvur tími var farin saksisparkaði hann eftir innkast í vinstru upp um seg sjálvan og upp um Jákup Mikkelsen. Bólturin brast í tvørtræið, og tað gjørdi hann eisini dygst undan hvíldini, tá ið Birgir eftir fína sending frá Ble við høvdinum royndi móti málinum.

Stutt frammanundan at hann javnaði til 2-2, hevði Birgir Jørgensen mint B36 á, at hann er vandamikil. Ble stóð fyri uppspælinum, skotið var fínt, men bólturin streyk framvið handara stólpanum.



*B36 var so nógv tann størsti favoritturin hetta umfarið í Formula-deildini, men undirtippaðu vágbingarnir megnaðu kortini at fáa eitt stig heim aftur við sær*

*savnsmynd*

### Hugflogið og tyngdin restaðu

Fyrstu løtuna gekk tað, sum tað kundi roknast við. B36 mundi hava bóltin omanfyri 80 prosent av tíðini. Teir royndu at seta ferð á, og onkra ferðina eydnaðist tað, hóast mótstøðumenninir avgjørt ikki vóru hugaðir at vera við í tí kappingini.

At B36 hevur trupulleikar frammi á vøllinum var eyðsýnt. Hesa ferð royndu teir við Mikkjali Thomassen í fremstu røð. Saman við honum vóru Sylla og Símun Hansen. Eingin teirra fekk mál, og í 2. hálvleiki vórðu bæði Sylla og Símun skiftir út.

B36 hevði nógvar royndir móti málinum hjá framúr væl upplagda Marcin Dawid. Oftast vóru royndirnar óneyvar, og verjuspælararnir hjá VB/Sumba vóru ikki bangnir fyri at ofra seg og blokera.

B36 fekk fyrstu fjøruti minuttirnar tey bæði málini, sum áttu at verið góð trygt undir trivaligum heimasigri. At tyngdin í álopspartinum ikki er sannførandi varð eisini undirstrikað av, at tað vóru verjuspælarar, sum skoraðu málini, og at bæði málini komu í sambandi við deyðbóltsstøður.

Kenneth Jacobsen skoraði til 1-0, tá ið eitt korter var farið. Eftir horna fekk hann eftir tvær royndir bóltin framvið málverjanum. Miðverjin Herbert í Lon Jacobsen økti um heimaleiðsluna, tá ið hann drønstútaði eftir hornasparksinnlegg.

So tyktist tað sum um, at tónin rættuliga var sligin ann, men bara í eina lítla løtu. Tveir minuttir eftir seinna B36 málið svaraði VB/Sumba aftur. Evrard Ble var fyrstur á eftir frísparkssending úr høgru, og við høvdinum stýrdi hann bóltin inn um landsliðsmálverjan hjá B36.

Fjáltur var á B36 í 2. hálvleiki. Hóast nógvar royndir, so fingu teir ikki málið, sum skuldi havt givið teimum trygga leiðslu. VB/Sumba hekk í, og eftir at Birgir Jørgensen hevði javnað til 2-2 bar til at staðfesta, at kendu fótbóltsnøvnini í B36, ikki høvdu megnað meiri enn spildurnýggir Formula spælarar sum eitt nú Julian Áki Joensen, Bárður Poulsen, Karl Lisberg, Artur Tausen og Jónar Borg Dahl!

At raski og skilagóði Hallur Dam Joensen tríggjar minuttir fyri leiklok sá reytt eftir óhepna takling var ivaleyst at liva við, hóast saknur verður í honum næstu ferð.

## Ole sær ljóst upp á tað

**Umframt eina stigið høvdu teir í VB/Sumba tveir nýggjar serbar í ferðalagnum suður sunnukvøldið**

VB/SUMBA
*Jóannes Hansen*

Umstøðurnar eru truplar, og stigaposin er léttur. VB/Sumba venjarin Ole Andersen hevur nógvar royndir, og hóast mótbrekkan hevur verið tung, so hevur lagið verið gott alla tíðina. Eftir hálva sigurin í Gundadali var lagið, sum tað plagar at vera:

– Eg vil fegin geva allar tær rósur til spælararnar, sum tað ber til. Ble og Soelberg halda væl saman upp á miðvøllin, men ungu menninir, sum hava millum fáar og ongar royndir, góvu alt móti meistarunum, og tað var flott av teimum at vinna eitt stig. Vóru vit heilt hepnir, so fingu vit øll stigini, heldur Ole Andersen.

Lagið var gott umborð á Smyrli á veg suður í góðveðrinum. Nú skal VB/Sumba til Eiðis, og so skulu teir spæla lyklauppgerðin á heimavølli móti B68 og á útivølli móti ÍF:

– Spælararnir hava rætta hugburðin, og í Gundadali sóu vit, at tað ber til. Teir báðir serbarnir, sum skulu hjálpa til, komu suður við okkum sunnukvøldið. Nú fáa vit at síggja, hvussu vit skulu brúka teir. At teir eru komnir afturat fer sjálvandi at síggjast aftur í venjingunum.

Fleiri nýggj nøvn vóru á liðnum?

– Onkrir av spælarunum hava verið við fyrr, og onkrir hava so at siga ikki spælt á besta liðnum. Ein ella tveir hava verið til skips, og tveir aðrir hava ikki vant, tí teir taka koyrikort. Treytirnar hava ikki verið nakað serligar, men tað er eingin ivi um, at evnini eru góð. Tað verður eisini strevið og torført næstu ferðirnar, men tað er gott útgangsstøði, tá ið rætti hugburðurin er til staðar.

## Reyðir um oyrini

Í B36 var hýrurin ringur, og teir skammaðust um úrslitið.

Eftir fulla úrtøku í Klaksvík og væl brúkiligan 2. hálvleik á Mølini varð lagt upp til, at trý stig skuldu fáast til høldar móti VB/Sumba, sum hevði lagt rygg til 7-1 tap á heimavølli móti KÍ 2. hvítusunnudag.

– Vit vóru uppsettir, og vit høvdu møguleikarnar at gera málini, sum skuldu til fyri at fáa øll stigini, men hetta var ikki okkara dagur, staðfestu teir í árstalsfelagnum, sum royndu at fáa leikferðina upp.

VB/Sumba drálaði tað, sum teir kundu. Dómarin legði fimm minuttir afturat vanligu leiktíðini. B36 hevði onkra vandamikla roynd, og tá ið Santos í eykatíðini fekk frísparks møguleika dygst uttanfyri brotsteigin, kendist tað sum um, at tað – hóast miseydnaðan dag – kortini fór at eydnast at fáa øll stigini. Men tað gjørdi tað ikki hjá B36, sum ivaleyst ger best í at gloyma besta sunnudagin higartil í 2006 – í hvussu so er hvat veðrinum viðvíkur!

”

*»Málast skal ikki við svørtum, men ”Skomm” hongur í luftini yvir Gundadali í dag.«*

*www.fcb36.org*

”

*»á www.b36.fo er eisini ein dystarfrásøgn, men hon er minni hugalig«*

*www.vb1905.fo*